# Bygdarráðsfundur

# Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 27.04.2020 kl. 17.30

Á fundi: Janus Thomsen
Eir J. Norðberg
Niels Olaf Eyvindsson
Gunnhild Mortensen
Rúni Thomsen
Sten Spange Larsen

Ikki møtt: Magni Bertholdsen

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

Formaðurin bað um loyvi at taka tvey mál við aftrat – hesi koma á skrá sum nr. 17 og 18.

1. **Skriv frá Hvalbiar Bygda- og Kolasavni.**
   Søkt verður um stuðul kr. 100.000,00 til keyp av hoyggjhúsinum matr. nr. 61 undir Lítla Hamri í Nesi.
   **Fíggjarnevndin 09.12.2019:**
   Einmælt samtykt at mæla til ikki at stuðla hesum.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá nevndini um ikki at játta umsóknini.

2. **Umsókn um stuðul til fløguútgávu frá Asyllex.**
   Søkt verður um kr. 5.000,00 í stuðli.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt ikki at stuðla fløguútgávuni.

3. **Umsókn um stuðul til námsferð frá 2. s á Miðnámsskúlanum.**
   3 næmingar úr Hvalba eru í flokkinum, ið søkir um stuðul til námsferð.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at stuðla við kr. 500,00 pr. næming úr Hvalba, treytað av, at ferðin verður veruleiki.

4. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Parkinsonfelagnum.**
   Felagið arbeiðir støðugt fyri at betra um viðurskiftini hjá sjúklingum og avvarðandi, eins og við upplýsing um sjúkuna.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at stuðla við kr. 3.000,00.

5. **Umsókn um fíggjarligan stuðul til Várframsýningina 2020.**
   Øll kunnu lata listaverk inn til Várframsýningina og stuðulsumsóknin er tí send øllum kommunum.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt ikki at stuðla framsýningini.

6. **Umsókn um stuðul við keyp av skaldsøgu frá Lív í Baiansstovu.**
   Søkt verður um, at kommunan keypir eitt ella fleiri eintøk av skaldsøguni, kr. 229 pr. bók.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt ikki at keypa bókina.

7. **Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 169a, Hvalba.**
   Søkt verður um at býta uttangarðsjørðina 6 gl. og 06 sk. í Stórustovuhaganum matr. nr. 521b frá matr. nr. 169a, Hvalba.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini um sundurbýti.

   Janus Thomsen fór av fundi, meðan mál nr. 8 varð viðgjørt.

8. **Umsókn um marknaumskipan millum matr. nr. 19l og 95f, Hvalba.**
   Søkt verður um, at matr. nr. 19l letur umleið 15 m2 til matr. nr. 95f, Hvalba.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini um marknaumskipan.

9. **Sáttmáli um skúlabarnaflutning millum Hvalbiar Kommunu og SSL.**
   Sáttmáli um skúlabarnaflutning fyri leið 701, galdandi frá 1. mai 2020 til 30. apríl 2027. Kostnaðurin fyri tænastuna er kr. 133.500 árliga uttan MVG, landið endurrindar 50%.
   **Trivnaðarnevndin 24.04.2020:**
   Nevndin mælir til at kanna, um møguligir næmingar úr Hvalba kunnu fáa ferðakort ístaðin fyri at gera sáttmála við SSL. Hetta er grundað á, at ongir næmingar hava tikið av tilboðnum at fara í 10. flokk seinastu árini.
   **Fíggjarnevndin 27.04.2020:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til at taka undir við sáttmálanum, havandi í huga, at hetta er ein partur av regluligu koyringini til Hvalbiar, ið allir borgarir kunnu gera brúk av.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

10. **Sáttmáli um skúlabarnaflutning innan kommunu.**

Verandi sáttmáli við Kartna Fornagarð fer úr gildi tann 30.06.2020.

**Trivnaðarnevndin 24.04.2020:**

Nevndin mælir til, at koyringin verður boðin út av nýggjum.

**Fíggjarnevndin 27.04.2020:**

Samtykt varð einmælt at mæla til, at koyringin verður boðin út av nýggjum.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt at bjóða skúlabarnaflutningin út av nýggjum.

Eir J. Norðberg fór av fundi, meðan mál nr. 11 varð viðgjørt.

11. **Innkomin tilboð uppá hurðar til Hvalbiar skúla.**

Claus Olsen hevur biðið um tilboð uppá hurðar frá tveimum veitarum, Tommy Olsen og Jákup Norðberg.

**Avgerð:**

Samtykt varð einmælt at bíða við hesum og seta pening av á fíggjarætlanini 2021.

12. **Sáttmáli millum Hvalbiar Kommunu og SNB.**

Uppskot til sáttmála um eftirlit og viðlíkahald av plastsperruni, meðan arbeiðið við bátahylinum fer fram.

**Vega- og havnanevndin 23.04.2020:**

Nevndin hevur verið á fundi við SNB um eftirlit og viðlíkahald av plastsperruni og hava gjørt uppskot til sáttmála. Samtykt varð einmælt at mæla til at taka undir við sáttmálanum.

**Fíggjarnevndin 27.04.2020:**

Einmælt samtykt at mæla bygdarráðnum til at taka undir sáttmálanum.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt.

13. **Skriv frá borgara um vegbungu:**

Spurt verður um møguleikan at fáa eina vegbungu ella líknandi á Torgrímsgøtu í Sandvík.

**Vega- og havnanevndin 23.04.2020:**

Nevndin mælir til, at eitt ferðsluspegl verður sett upp í hornið, har Støðarvegur, Kirkjuvegur og Sandvíksvegur møtast.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá nevndini.

14. **Skriv frá Tilbúgvingarnevndini:**

**a) Fámjins Kommuna við í samstarvið:**

Fámjins Kommuna hevur sent umbøn um at koma við í felags tilbúgvingarsamstarvið millum Tvøroyrar- og Hvalbiar Kommunur. Tilbúgvingarnevndin hevur á fundi 7. februar mælt til at ganga umbønini á møti – gjaldið verður eftir fólkatali.

**Tekniska nevnd 22.04.2020:**
Nevndin mælir til, at Fámjins Kommuna kemur við í samstarvið.
**Fíggjarnevndin 27.04.2020:**
Samtykt varð einmælt at mæla til, at Fámjins Kommuna kemur við í samstarvið.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

**b) Átaksbilur í Hvalba:**
Hvalbiar Kommuna hevur heitt á Tvøroyrar Kommunu um, at samstarvið útvegar nýggjan átaksbil til Hvalba, tí verandi bilur er gamal og ikki tíðarhóskandi.
Tilboð frá Reyni Service uppá ein Proace 2,0 D Long: kr. 205.000,00 v/MVG
Tilboð frá Fønix uppá MFU Barracuda v.60 m.slangu og 2 luftfløskum: kr. 98.800,00 u/MVG
**Tekniska nevnd 22.04.2020:**
Einmælt samtykt at mæla til at taka av tilboðunum frá Reyni Service og Fønix.
**Fíggjarnevndin 27.04.2020:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av hesum tilboðum.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**c) Keyp av bygningi í Líðini til brandstøð – Tvøroyrar Kommuna:**
Tvøroyrar Kommuna hevur keypt bygningin hjá Norcon í Øravíkarlíð. Ætlanin við bygninginum er, at sløkkiliðið kemur at brúka hálvan bygningin, meðan Tvøroyrar Kommuna kemur at brúka hina helvtina til arbeiðsbrúk, amboð v.m.
**Tekniska nevnd 22.04.2020:**
Nevndin hevur ikki tikið støður til málið vegna vantandi framtíðarætlanir v.m.
**Fíggjarnevndin 27.04.2020:**
Samtykt varð einmælt at taka undir við ætlanini um at flyta sløkkistøðina í henda bygning.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

**15. <u>Skriv frá Hagastýrinum fyri Sandvíkshagan viðv. tyrvingarplássi</u>.**
Hagastýrið fyri Sandvíkshagan hevur sent nýtt skriv viðvíkjandi tyrvingarplássi í Sandvík. Teir vilja lata umleið 7.000 m2 av lendi til endamálið og vilja gera ein sáttmála um leigu kr. 10.000,00 um árið og kr. 2.500,00 fyri mist bit (verður goldið eina ferð).
**Tekniska nevnd 22.04.2020:**
Nevndin mælir til at góðtaka uppskotið frá Sandvíkshaganum.
**Fíggjarnevndin 27.04.2020:**
Samtykt varð einmælt at beina málið aftur í Teknisku nevnd og fáa ein sáttmála kláran til støðu-takan á komandi fundi – gildistíðin fyri sáttmálan verður 4 ár.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

16. **Ansingargjøld á dagstovninum.**
Orsakað av Korona og tilmælum í hesum sambandi, hevur dagstovnurin verið afturlatin/nógv skerdur í ein góðan mánað, frá 16.03. til 20.04.
**Fíggjarnevndin 27.04.2020:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at endurrinda foreldragjaldið fyri ein mánað.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

17. **Tilboð frá Sandfrakt um at taka upp sand av Bíargarði.**
**Vega- og havnanevndin 24.04.2020:**
Nevndin hevur verið í sambandi við Sandfrakt um at tøma sand úr hylinum á Bíargarði. Arbeiðið kemur at taka 1-2 dagar. Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av tilboðnum, tá tað í løtuni ikki eru onnur pláss at leggja smábátar í sóknini.
**Fíggjarnevndin 27.04.2020:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av hesum tilboði.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

18. **Tilboð viðvíkjandi Hamranesi.**

**a) Innkomin tilboð uppá tøming av hylinum á Hamranesi.**
Innkomnu tilboðini eru frá Articon og J & K Petersen
**Vega- og havnanevndin 07.04.2020:**
Nevndin mælir til at taka av tilboðnum frá Articon.
**Fíggjarnevndin 07.04.2020:**
Samtykt varð einmælt at taka av tilboðnum frá Articon.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**b) Goymsla av skervi á Hamranesi – fyrispurningur frá Articon:**
Articon hevur spurt um loyvi at brúka part av bryggjuni á Hamranesi til goymslu av skervi.
**Vega- og havnanevndin 07.04.2020:**
Nevndin mælir til at geva loyvi til goymslu av skervi á eystara armi á Hamranesi.
**Fíggjarnevndin 07.04.2020:**
Samtykt varð einmælt at játta hesum.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**c) Innkomið tilboð uppá aldusimuleringar frá DHI.**

Tilboð frá DHI í sambandi við uppafturbygging av Hamranesi á kr. 420.000,00 uttan MVG.

**Vega- og havnanevnd 07.04.2020:**

Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av tilboðnum frá DHI kr. 420.000,00 uttan MVG.

**Fíggjarnevndin 07.04.2020:**

Nevndin mælir somuleiðis til at taka av hesum tilboði.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt.

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 19.30

| | | |
|---|---|---|
| Janus Thomsen | Eir J. Norðberg | Niels Olaf Eyvindsson |
| Gunnhild Mortensen | Rúni Thomsen | Sten Spange Larsen |